# OY-arin

Føroyskir Radioamatørar

**Nr. 135** | **27. árið** | **mars 1993**



OY-arin nr. 135, mars 1993

# FØROYSKIR RADIOAMATØRAR

Stovnað 11. apríl 1965
Member Society of **INTERNATIONAL AMATEUR RADIO UNION**
Bústaður: P. O. Box 343, FR-110 Tórshavn, Faroe Islands
Felagshøli: Hamrabú, Yviri við Strond 22, 100 Tórshavn
Tlf. +298 10644 Girokonto nr. 50881

**NEVND FELAGSINS**

| | | | |
|---|---|---|---|
| *formaður:* | | Fax. | 44214 |
| ***OY4AH*** | Annfinn Hansen | tlf. | 44300 |
| *næstformaður:* | | | |
| ***OY3FT*** | Frits Thorbek | tlf. | 18345 |
| *kassameistari:* | | | |
| ***OY2VO*** | Palle Olsen | tlf. | 13694 |
| *skrivari:* | | | |
| ***OY5J*** | Jóhanna Hansen | tlf. | 14031 |
| *samskiftisleiðari:* | | | |
| ***OY3JE*** | Jan Egholm | tlf. | 14425 |
| *1. tiltakslimur:* | | | |
| ***OY9R*** | Otto Rubeksen | tlf. | 15923 |
| *2. tiltakslimur:* | | | |
| | | tlf. | |

Samband við N.R.A.U.:
***OY7ML*** Martin Haasen tlf. 13793
Samband við I.A.R.U., T.F.L. og P&T:
***OY1A*** Arne Juul Arnskov tlf. 11740

QSL-manager: ***OY2J*** Jóhan Isholm
Box 1358, FR-110 Tórshavn tlf. 13225

Blaðstjóri & Awards-manager:
***OY1A*** Arne Juul Arnskov,
Lauritsargøta 11 A,
FR-100 Tórshavn tlf. 11740 & 61169

## Innihald:

Frá blaðstjóranum 3
Nevndarval 3
Rætting 3
Eykaársaðalfundurin 3
Á áraðalfundi í Hamrabú 4
Fundarfráboðan 4
Ein lítil heilsan... 5
Antennurnar í Hamrabú 5
Västerås Radioklubb 5
WAOY til Grønlands 5
VHF-UHF-SHF fundur í Danmark 5
Viðtøkur felagsins 6-7
Kebnekaise 8
QSL via.... (2. partur) 9
Til sølu 11
Limagjaldið 11
TRIADE-verkætlanin 11
DX 12
Páskakappingin 12

***OY6FRA*** hoyrist hvørt týskvøld á repeataranum kl. 19.30.
Regliligu fundirnir eru annaðhvørt mikukvøld kl. 20.00 í felagshølunum Hamrabú, Yviri við Strond.

***FELAGSSTØÐIRNAR:***

***OY6FRA***
Felagshúsið IP 62 OA ant. 5el. rotary beam til 6, 10, 15 og 20 m. wire ant. og GP til 40 m. wire ant. til 80 og 160 m.

***OY6REA***
Umsetari á Sornfelli IP 62 MB innp. 145.025 MHz útp.145.625 MHz ant. vertical orka 25 watt 1750 Hz.

***OY6VHF***
Vitasendari á Húsareyni IP 62 OA útp. 144.825 MHz orka 25 watt 50 watt ERP ant. horisontal

***OY6UHF***
Vitasendari á Húsareyni IP 62 OA útp. 432.885 MHz orka 25 watt 50 watt ERP ant. horisontal

Blaðstjórn:
***OY1A*** & ***OY2H***
Myndagerð:
***OY3FT***
Seting, umbróting og fjølritan: Sisero tlf. 19766

Forsíðumynd:
300 watt sendari
frá 1926

# Frá blaðstjóranum

**Vit hava krepputíðir. Arbeiðsloysi og vánaligar fíggjarstøður. Alt samfelagið venar seg.
Vit mugu øll spara, og vita annars ikki, hvat verður at henda.
Øll vóna vit, at botnurin er komin, men tora ikki at trúgva tí.
Vit koyra við fullari ferð móti tromini.
Øll spara, og tað gongur út yvir øll feløg - og har ímillum eisini FRA.
Í skrivandi løtu (4/3) hava bert sera fáir limir goldið limagjaldið fyri 1993, og vit mugu tí rokna við at missa limir, sum kanska í fleiri ár hava stuðlað felagnum. Eisini kunnu vit rokna vit at talið á OY-kallimerkjum minkar.
Gjaldið fyri sendiloyvini er hækkað nógv, og hetta fer óivað fyrst og fremst at gera tað, at sendiloyvi, sum kanska ikki hava verið nýtt í nógv ár, verða strikað. MVG oman á alt, ger ikki støðuna hugaligari.
Radioeftirlitið hevur mótmælt yvir fyri TFL, at MVG verður lagt oman á hetta gjaldið, og, okkum kunnugt, hevur tað eydnast radioeftirlitinum at fáa TFL at síggja tað skilaleysa í hesum, og kunnu vit tí rokna við, at sleppa undan MVG í samband við sendiloyvini.
Hetta - sjálvir at avgreiða hendan trupulleikan - eigur radioeftirlitið stóra tøkk fyri!.
FRA hevur - meira enn nakrantíð - tín stuðul fyri neyðini.
Royn tí at vera virkin í felagnum, og lat ikki alt koma at hanga á teim somu gomlu herðunum!**

*IA.*

# Nevndarval

Á komandi ársaðalfundi skulu vit velja 3 nevndarlimir. Enn er tó onki uppskot um valevni komið inn.

2 av teim fráfarandi nevndarlimunum, Johanna, 5J, og og Fritz, 3FT, ætla ikki at stilla uppaftur, og í skrivandi løtu hevur nevndin ikki funnið nakran, sum hevur hug til nevndararbeiði.

Sitandi nevnd hevur ikki verið før fyri at finna valevni fyri teir 3 nevndarlimirnar, sum hava sitið sítt 2-ára skeið, og, sum sagt, ongi uppskot um valevni eru komin frá limunum. Sum støðan er, heldur nevndin, at teir 3, sum eftir eru, verða sitandi, og val verður einki á hesum sinni. Teir 3 eftirsitandi nevndarlimirnir mugu so royna at fáa hjálp frá onkrum limum, sum kunnu gera arbeiðið hjá teimum báðum, sum ikki vilja halda fram, tí tey ikki hava stundir til nevndararbeiði, og vónandi verður tað so møguligt, at finna nýggj valevni til 1994.

Møtið fjølment til fundar 27. mars, og verið til reiðar at gera eitt arbeiði fyri FRA.

# Rætting

Seinasta blað, tað sum kom í november í fjør, var merkt nr.135.
Tað var ikki rætt, og mugu vit átaka okkum ábyrgdina av hesari villu.
Gerið so væl at rætta tað nummarið til 134. Hetta blaðið er nr. 135, og so hava øll fingið nr. 134 eisini!
Vit biðja um fyrigeving!
Aðrar villur vóru tíverri eisini. T.d. var greinin hjá 2H um ársaðalfundin bert komin 50% við, og, fyri at fáa hana í heilum líki, verður hon prentað uppaftur her

# Eykaársaðalfundurin

Eykaársaðalfundurin varð hildin í Hamrabú leygardagin, 28. november 1992 klokkan 15.
Tá fundurin varð settur klokkan 1520, vóru 21 limir møttir.
Alif, 5A, varð kosin orðstýrari.
Fyrst vórðu lógarbroytingarnar í sambandi við flytan av ársaðalfundinum einmælt góðkendar. Síðani legði Otto, 9R fram grannskoðaða roknskapin fyri árið 1991, sum var orsøkin til eykaaðalfundin, fram til góðkenningar. Eftir eitt sindur av tosi aftur og fram, varð roknskapurin góðkendur.
Síðani varð tosað um fíggjarstøðu okkara, og um, hvussu vit skuldu økja um inntøkurnar, og samstundis minka útreiðslurnar.
Semja var um, at nevndin skuldi finna eina skilagóða loysn viðvíkjandi skuld okkara, at leggja fyri næsta ársaðalfund, sum, samb. nýggju lógarbroytingunum, skal vera í februar-mars 1994.

# Á ársaðalfundi í Hamrabú

Tað mundi vera mangur, ið undraðist, tá fundarboð komu til vanliga ársaðalfundin, sum verða skuldi leygardagin, 3. oktober 1992 klokkan 1500.

Sjálvur undraðist eg stórliga, og gjørdi av, at eg skuldi á fund, um ikki fyri annað, so fyri at finna út av, hvussu nevndin hevði tað, tí tað var púra greitt, at støðan var ikki góð.

Sjálvandi var tað í lagi at hava fund, har skráin var sambært grein 6 í felagslógini, men tað, sum skrivað var í fundarfráboðanini annars, var heilt burturvið.

Nú hoyrdi eg undan fundinum, at orðaljóðið skuldi "provokera" limirnar! - og tað segði formaðurin eisini okkurt um, tá hon sleyt tann 2 tímar langa fundin. Ein fundur, sum var lýstur í úrtíð, tí har var m. a. ongin roknskapur at leggja fram til góðkenningar - men nú kann tað vera tí, at nevndin ikki kennir grein 6 í felagslógini - tí mátti verða lýst til ein eykaaðalfund, og so hava roknskapin kláran til góðkenningar!

Nú, eg skrivi hetta, fer oktober at gerast til november, og onki er frætt frá nevndini, men vit vita jú, at nevndin, sum hon sjálv sigur: "er troytt av at vera noydd til at vera tey einastu, sum skulu gera nakað"! - Ja, álvaratos, kann tað sigast betur?

Tá eg fór í Hamrabú tann leygardagin, hevði eg gjørt av, at fundarfólk skuldu sleppa at hoyra, hvat eg meinti um støðuna, sum hon var, og tað vóni eg, at tey flestu fingu eina fatan av, og hugaligt var hjá mær at bæði Frits og Alif søgdu sína skilagóðu hugsan um tað, sum eg hevði lagt fram

Onki orð frá nevndini annars um avtøku av felagnum. Kanska tí, at eg hevði loyst av posabandinum í góðari tíð.

Eg var ongantíð bangin fyri, at felagið skuldi verða avtikið, tí sambært lógini, so letur hetta seg ikki gera, um so er, at í minsta lagi 10 limir ynskja at halda fram, so tað var ikki tí, eg møtti á fundi, men ætlaði, sum sagt, at lata nevndina vita, hvar eg stóð, og so ætlaði eg eisini, at fáa meira at vita um sjálva nevndina og hennara arbeiðsevni, - og so sanniliga, tað tók ikki langa tíð at staðfesta tann syrgiliga veruleikan, at nevndin var óarbeiðsfør! - har vóru hvørki evni ella vilji til steðar, tíverri! Og disse regeres vi af!!

Alt, sum eg segði á fundinum, standi eg við. Tað einasta, sum eg eri eitt sindur keddur av, er , at eg, undir tosinum um "OY-aran" og blaðstjóran, lýsti 1A sum ein gamlan, danskan pensiónist, tí tann málburðurin var óheppin, og tað fari eg at biðja Arna um at fyrigeva mær. Vónandi er hann greiður yvir, at tað var als ikki so illa meint, sum tað var sagt - og eg gevi honum hervið loyvi til, at kalla meg "ein avdankaðan føroyskan pensiónist"!

Vit skulu hava ein eykaaðalfund - nær? - lat okkum í øllum førum vóna, at roknskapurin tá kann verða lagdur fram til góðkenningar!

Eitt annað, sum eg hevði á orði á fundinum, var tann stóra skuldin hjá okkum fyri útgerðina í Hamrabú, sum var 70.000 (minnist meg rætt) fyri tveimum árum síðani, men nú er komin upp á 89.000 krónur! Vit hava seinastu árini mist einar 40 limir. Eftir eru tó 89 limir, og soleiðis verður skuldin pr lim "bert" 1000 krónur, ótrúligt! - og ongin ger nakað!!

Hetta kemur óivað undir tað, sum okkara troytta nevnd ikki leggur í at fáast við?

Eg undraðist eisini á, at ongin nevndarlimur hevði sagt seg frá - tí tað ber jú til, - og eg undraðist á, tá fundurin var liðugur, at ongin hevði nakað upp á hjartað!

Eg veit væl, at "saman at standa var ei okkum givið", men at tað var so øskukalt hjá okkum, tað vardi meg ei!

vinarliga

2H

## Fundarfráboðan

Ársaðalfundur verður í Hamrabú leygardagin 27. mars 1993, klokkan 15.00 við hesari dagsskrá:

1. Val av orðstýrara
2. Formaðurin greiðir frá farna árinum
3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi til góðkenningar
4. Val av nevnd, tveimum tiltaksmonnum og grannskoðara
5. Innkomin mál (ongi mál innkomin)
6. Ymiskt

# Ein lítil heilsan frá fyrrverandi formanni

So hava vit aftur havt aðalfund, og vit hava fingið nýtt fólk í nevndina.

Samstundis hava vit fingið nýggjan formann, og vil eg her nýta høvi til at ynskja Anfinni góða eydnu við formannsstarvinum.

Tá vit boðaðu til aðalfundar, høvdu vit samstundis eitt uppskot um at avtaka felagið.

Hetta kom tíverri ikki at virka eftir ætlan. Bert ein mótmælti harðliga, at nevndin vágaði sær at koma við slíkum uppskoti.

Felagið verður helst ikki avtikið hesa ferð, men vit mugu sanna, at tað er einki lív í felagnum. Hvør so hevur skyldina av tí, kann vera tað sama.

Tað, vit ynsktu og vónaðu at fáa frá limunum, var uppskot um, hvat kann gerast.

Onkur sigur ivaleyst, at tað er ein vánalig nevnd, sum einki kann fáa av skafti, men eg sigi eina ferð enn, at einki felag kann vera við bert eini nevnd. Limirnir mugu eisini rætta eina hond, og helst uttan at verða bidnir um hetta hvørja ferð.

Vit fara skjótt av hava eykaaðalfund, har okkara roknskapur skal leggjast fram, og vit fara eisini at tosa um framtíðina hjá felagnum.

Fíggjarstøðan er út av lagi ring, og vit noyðast at finna eina loysn sum skjótast.

Eg havi hugsað nógv um hetta, og eg kundi hugsað mær, at vit heittu á limir okkara, um at lata eina peningagávu, lítla ella stóra, alt verður móttikið við tøkk, og eingin skal føla seg illa, um tað ikki ber til at lata nakað.

Tað stóra lánið, vit hava, má fáast nakað niður.

Tá lánið varð tikið, varð roknað við fittari inntøku av lýsingarblaði, men vánaliga fíggjarstøðan hjá øllum ger, at ikki er hugsingur um at fara í holt við nakað sovorðið.

Vit eru hóast alt góð við okkara "steindeyða" felag, og um vit øll royna, so má ein framtíð vera lagað hesum lítla felag.

Eg fari at takka fyri mína tíð sum formaður og enn eina ferð ynskja Anfinni alt tað besta.

*Jóhanna, OY5J.*

# Antennurnar í Hamrabú

**Óðnarveðrið í vetur hevur gjørt antennum okkara eina bjarnatænastu:**
**20m-antennan er dottin niður øll, sum hon er. Helvtin av antennueindunum á 10m-antennuni eru burtur. 15m-antennan virkar væl, men ein minni eind sær út til at sita eitt sindur leys. Tráðantennurnar til lægru bondini eru fleiri dotnar niður, meðan 40m-GP og 18m-GP koyra, hóast onnur hevur mist eina bardum, og tí stendur eitt sindur skeiv.**
**Vónandi fer tað at eydnast okkum at fáa "antennufarmin" afturgjørdan í næstu framtíð, so at vit aftur kunnu fara í luftina á øllum bondunum!**

## Västerås radioklubb

VRK, sum fyri nøkrum árum síðani vitjaði her, og tá m.a. koyrdi úr Hamrabú, hevur 50 ár á baki í ár.

Í hesum sambandi hava teir gjørt eitt diplom fyri samband við VRK-limir í tíðarskeiðnum, 01.01. - 30. 04. 1993.

Nærri upplýsingar um hetta diplomið finnast á talvuni

## WAOY til Grønlands

Tað fyrsta diplomið eftir nýggju reglunum, sum m.a. siga, at WAOY kann verða latið fyri "mixed-mode", varð í januar í ár latið til Carsten, OX3CS.

Neyðugu stigini til WAOY 3-mixed fekk Carsten útvegað sær í páskakappingini í fjør. Carsten er samstundis fyrsti radioamatørurin í Grønlandi yvirhøvur, sum hevur fingið WAOY!

## VHF-UHF-SHF fundur í Danmørk

15. norðurlendski VHF-UHV-SHF fundurin verður hildin í Freerslev, sum liggur tætt við Haslev á Suðursælandi, í døgunum 11. - 14- juni 1993.

Meira stendur um hendan fundin á talvuni í Hamrabú.

Tað ber eisini til at heinta upplýsingar frá OZ1DOQ, Uffa, telefon 031 59 89 70 ella frá Ivan Stauning, OZ7IS, sum fleiri av okkum kenna, og hansara telefon er heima 042 52 33 14, ella 044 92 26 11 ext.329, Fax 044 02 29 01, att. Ivan Stauning.

# Viðtøkur felagsins

**eftir seinastu broytingar á eykaaðalfundinum, 28. november 1992.**

## I. Navn og endamál

**Grein 1**

Navn felagsins er FØROYSKIR RADIOAMATØRAR, stuttstavað FRA og er tengt at alheims radioamatør-samgonguni "The International Amateur Radio Union" (IARU).

**Grein 2**

Endamálið er at fylkja allar radioamatørar í Føroyum og virka fyri øktum tekniskum og praktiskum kunnleika á samskiftisøkinum. at venja upp limir til at vísa góðan sið sum sendiamatørar, og at umboða teir yvir fyri øðrum radioamatørfeløgum og myndugleikum.

## II. Limir felagsins

**Grein 3**

Øll, sum hava áhuga fyri amatørradio ella sjónarmiðum, sum kunnu vera knýtt at hesum ítrivi, kunnu gerast limir í FRA við at venda sær til nevndina.

**Grein 4**

Limunum er álagt at gjalda innlimingargjald og annars at gjalda eitt árligt limagjald.
Limagjaldið fellur til gjaldingar 1. januar.
Nevndin hevur heimild til at taka eitt lægri gjald frá: pensiónistum, fólki í útbúgving, taka ímóti 5 ára gjaldi og familjugjaldi, sum er fult gjald fyri fyrsta limin og hálvt gjald fyri restina av familjuni.
Eftirstøða er ikki loyvd. Kemur limur í eftirstøðu, verður hann strikaður av limalistanum, og kann bert gerast limur aftur við at gjalda skuldina og innliman av nýggjum.
Nevndin hevur heimild til at útnevna heiðurslimir. Hesir gjalda ikki limagjald.

## III. Aðalfundur

**Grein 5**

Ársaðalfundurin er hægsti myndugleiki í øllum viðurskiftum felagsins.

**Grein 6**

Ársaðalfundurin verður hildin í februar/mars mánaða.
Fundurin skal vera fráboðaður í minsta lagi eina viku frammanundan, og dagsskráin er henda:

1. Val av orðstýrara.
2. Formaðurin greiðir frá farna árinum.
3. Framløga av grannskoðaðum roknskaði til góðkenningar.
4. Val av nevnd, tveimum tiltaksmonnum og grannskoðara.
5. Innkomin mál.
6. Ymiskt.

**Grein 7**

Felagsnevndin hevur 5 limir, og verða valdir annað hvørt ár tveir og annað hvørt ár tríggir limir, sum fara frá, men kunnu veljast aftur.
Ikki hjástaddir limir kunnu ikki verða valdir í nevnd uttan frammanundan at hava játtað at vilja taka ímóti vali.
Veljast kann við brævatkvøðu ella á aðalfundinum.
Uppskot til nevnd verða send nevndini áðrenn 31. januar.
Tá lýst verður til fundar, verða eisini atkvøðuseðlar sendir øllum limum. Limur, sum ætlar at nýta brævatkvøðu, sendir hesa til sitandi nevnd áðrenn ársaðalfundin.
Um limur, ið hevur sent brævatkvøðu, møtir á ársaðalfundinum, fær hesin ikki atkvøðuseðil útflýggjaðan á fundinum.

**Grein 8**
Ársaðalfundurin ásetur innlimingargjaldið og limagjaldið.
**Grein 9**
Uppskot og annað, sum ynskjast upptikin á dagsskránna undir grein 5: t.e. innkomin mál, mugu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 15. januar.
**Grein 10**
Vanligur meiriluti krevst fyri at fáa mál samtykt, men tá viðtøkurnar skulu broytast, krevst, at í minsta lagi 25% av skrásettum limum 1. januar, atkvøða fyri.
**Grein 11**
Um so er, at ársaðalfundurin ikki er viðtøkuførur, kann nevndin innan 14 dagar kalla til eykaaðalfund, sum altíð er viðtøkuførur við vanligum meiriluta.

## *IV Nevnd felagsins*
**Grein 12**
Nevndin skipar seg sjálv við formanni, næstformanni, skrivara og kassameistara í seinasta lagi 14 dagar eftir aðalfundin.
**Grein 13**
Nevndin heldur fund eftir tørvi samsvarandi reglugerð fyri nevndarfundir - tó minst fýra ferðir árliga.
**Grein 14**
Nevndin hevur heimild at skuldbinda felagið við vanligum meiriluta, tó í mesta lagi við eini upphædd ájavnt við 2 ferðir síðsta árs limagjald.
Tveir nevndarlimir í felag binda felagið við undirskriftum sínum.
Keyp og søla av fastari ogn krevur aðalfundarsamtykt.
**Grein 15**
Nevndin er heimilað at velja undirnevndir og/ella arbeiðsbólkar, har nevndin tó altíð hevur fulla ábyrgd.
Nevndini er álagt at syrgja fyri, at høli felagsins verður hildið viðlíka samsvarandi reglugerð fyri sama.

## *V Eykaaðalfundur*
**Grein 16**
Krav um eykaaðalfund kann verða sent nevndini, og má vera undirskrivað av í minsta lagi 10 limum.
Eykaaðalfundur verður fráboðaður eins og vanligur ársaðalfundur, og skal verða hildin í seinasta lagi 3 vikur aftan á, at krav um fund er komið nevndini í hendi.
Nevndin kann eisini sjálv kalla til eykaaðalfundar.

## *VI Avtøka av felagnum*
**Grein 17**
Felagið kann ikki verða avtikið, um so er, at 10 limir, ella fleiri, ynskja at halda fram.

## *VII Yvirgangsreglur*
**Grein 18**
Við ársaðalfundin 1989 fara tríggir limir úr nevndini og í 1990 tveir.
Áðrenn ársaðalfundin1989 avger nevndin við lutakasti, hvørjir tríggir limir standa fyri vali.

# Kebnekaise

## - longur upp sleppur tú ikki í Svøríki.

Hyggja vit í atlasið, so ber til at finna út av hvar hægsta fjallið í Svøríki liggur. Fyri tað fyrsta, liggur tað rættiliga norðalaga, ja, norðan fyri polarkringin, á umleið 68N og 18E, soleiðis grovt roknað, og mest kendi býurin, sum liggur einar 50-60 km eystanfyri, er Kiruna. Fara vit so einar 50-60 km í ein útnyrðing, so hava vit Narvik í Noregi. Ja, har norðuri umleið liggur Kebnekaise, og meira enn so, at har kann vera vetur um summarið. Svenski radioamatørurin, Magnus Wessenius, SMøNJO, sum hevur gjørt nakrar smærri DX-ferðir m.a. til C5, OHø, TF og OJø, setti sær fyri á sumri 1991, at han skuldi gera eina slíka DX-ferð upp á Kebnekaise summarið 1992.

Slík ferð skal fyrireikast væl, sjálvandi, og í juli mánaða í 1992 skuldi tað so vera.

Sjálvan ólavsøkudag fór Magnus við flogfari til Kiruna, saman við vinmanninum, Paul, og teir høvdu við sær ein FT757 GX (100w) við matchbox og manipulatori, og eina 14 MHz dipól antennu, umframt proviant.

Í Kiruna høvdu teir biðið um eitt 12v 14Ah battarí, sum teir ætlaðu skuldi kunna geva teimum 2 tímar á CW. Teir koyrdu so við bussi til Nikkaluokta, og har byrjaði so ferðin til Kebnekaise. Nú høvdu teir báðir knapt hundrað pund at bera á rygginum, útgerð og matur. Fyrst gingu teir til eina fjallasmáttu, 600 metrar uppi, og umleið 19 kilometrar frá Kiruna, og hetta tók teimum 5 tímar. Svóvu í tjaldi har tað náttina, og dagin eftir, 30. juli, byrjaðu teir so ferðina upp á sunnara tindin á Kebnekaise.

Teir høvdu lagt okkurt eftir, fyri at lætta um, og høvdu proviant við til 2 samdøgur. Um kvøldið komu teir til seinastu fjallasmáttuna, sum liggur 1880 m uppi, og vóru rættiliga pøstir tá teir løgdu seg at sova. Morgunin eftir var vindurin vaksin og hitin var kropin niður á 0 stig, og veðurfrásagnirnar vóru ikki tær bestu, men skuldi ferðin eydnast, so máttu teir skunda sær tað strekkið, sum eftir var, í rættiliga nógvum kava og vánaligum sýni. Hetta seinasta strekkið tók teimum ikki meira enn hálvanannan tíma, og so vóru teir komnir upp á syðra tindin á Kebnekaise, sum er 2111 m høgur, og tá frysti 4 stig. Teir settu beinanvegin tann 10 metur langa dipólin upp á kavaeggini, sum var umleið hálvanannan metur breið. Vindurin vaks nú og kavarok varð, so tað var bert at gera skjótt av, skuldu teir fáa okkurt QSO í loggina. Fyrsta QSO teirra var koyrt 31. juli klokkan 0834 GMT á 14 MHz CW, og teir vóru bert í luftini eitt korter vegna vánaliga veðrið.

Á veg niður aftur sást onki, hvar teir vóru komnir upp: kavastormurin hevði fjalt øll spor, og kortið mistu teir so eisini, men kumpassin bjargaði teimum oman aftur til ovastu fjallasmáttuna, og har máttu teir so verða í 2 samdøgur, orsakað av ringa veðrinum. Tey bæði døgnini, teir vóru í fjallasmáttuni, var hitin 2 stig pluss og vindmegin umleið 18 m/s, men bíðitíðin har gekk við virksemi á 14 MHz. 2. august blíðkaði veðrið og sýnið gjørdist gott. Teir fóru tá uppaftur á tindin, fyri at njóta sólina og útsýnið, - og taka nakrar myndir, og fóru so loksins niður aftur til Kebnekaise fjallasmáttuna




*Hetta kortið vísir økið í Norðursvøriki, har hægsta fjall teirra, Kebnekaise, liggur.*

og svenska summarið.
Hesin stubbin um eina mini-dxferð er tikin úr svenska blaðnum "QTC", og hóast hesin DX-ferðamaðurin ikki ferðaðist til fremmand lond, men helt seg heima hjá sær sjálvum, so helt eg tað vera rættiliga hugaligt at lesa, og hugsaði, at kanska onkur OY-ari onkuntíð fór at finna upp á okkurt sovorðið. Vit hava sjálvandi einki so høgt fjall sum sviar við teirra Kebnekaise, har norðurtindurin er 2117 metrar, men vit hava tó t.d Slættaratind og, fyri at gera tað eitt sindur meira spennandi, Lítlu Dímun!
Nú skal eg ikki lokka nakran upp á Slættaratind og enn minni út í Lítlu Dímun, men eg kann fortelja, at eg í 1965 hevði eitt QSO av Skælingi við DL7AA í Berlin á 28 MHz! Hetta var ongin DX-ferð av nøkrum slag, men bert ein hugnalig útferð í fagrasta augustveðri saman við øðrum limum í okkara nýstovnaða felag, har vit høvdu aðrar sitandi yviri við Strond hjá Júst fyri at vit, sum vóru norðanfyri, kundu hava samband við høvuðstaðin. Ídag haldi eg meg meira til láglendið, men onkur annar torir kanska?

*OY2H*

# QSL via...
## (2. partur)

Seinast varð skrivað um at senda QSL "via buro". Ein annar møguleiki er, at senda QSL beinleiðis, og hetta kann í ávísum førum vera einasti møguleiki at fáa fatur á einum ávísum korti, sum ikki bert er ein Hanus og Janus í QSL samanhangi.. Orsøkirnar kunnu vera so ymiskar til, at beinleiðis avgreiðsla er einasti møguleiki, og allarhelst er orsøkin tann, at viðkomandi radioamatørur ikki hevur møguleikan at avgreiða kort síni á annan hátt. Kanska hevur tú haft samband við eina DX-støð, sum hevur koyrt úr einum landi, har ongin QSL-støð er, ella av onkrari oyggj, har ongin radioamatørur (ella fólk annars) eru og tí ongin QSL-tænasta, og hetta er bert fyri at taka okkurt úr rúgvuni av orsøkum, tí tær eru so nógvar.. Tað kemur fyri, meira enn so, at DX-støðir finna sær fjarskotin og spennandi QTH, og koyra eini 40.000 QSO, bert fyri at taka okkurt tal, í einar tvær vikur, og so ikki vilja, at teirra egna QSL-støð skal taka sær av hesum risaarbeiðnum, og tí má finna aðrar møguleikar fyri at fáa QSL-avgreiðsluna at virka. Møguliga sigur DX-støðin sjálv frá, hvussu avgreiðslan skal fara fram. Møguliga vísir DXarin til sítt egna QTH, sum tú kanst finna í einari Amateur Radio Callbook, sum verður útgivin á hvørjum ári, og hevur flestu radioamatørar skrásettar eftir londum og kallimerkjum, ella kanska tú fært at vita, at QSL skal ganga ígjøgnum ein ávísan QSL-avgreiðslumann o.s.fr.
Tað er tó ikki altíð so lætt at finna út av, hvussu ein skal bera seg at, og tí er tað altíð ein fyrimunur, at ein sjálvur fylgir væl við í DX verðini yvirhøvur, og tað gerst eina best við at lesa amatørradio tíðarrit, og har finna fram til loysnir, tí hesi tíðarritini vita rættiliga nógv, fyri ikki at siga alt, um, hvat ið fer fram á DX-økinum.
Tú hevur tveir møguleikar, tá tú skalt avgreiða QSL beinleiðis: SAE ella SASE, har SAE merkir Self Addressed Envelope, og SASE merkir Self Adressed Stamped Envelope, og í báðum førum skalt tú skriva hansara adressu á ein brævbjálva, og í hann leggur títt QSL-kort og ein annan brævbjálva við tínari adressu á. Hevur DXarin møguliga biðið um SASE, skalt tú seta óstemplað frímerki frá heimlandi hansara á, men mest vanligt er SAE, og tá verður roknað við, at tú sendur passandi upphædd við til returporto. Hendan returportoin kann verða ein "Greenstamp" t.v.s. ein dollari, ella ein IRC , International Reply Coupon. Vit liggja soleiðis fyri, at vit ofta fáa bæði svarkupongir og dollarar sendandi, og tí ofta hava okkurt sovorðið liggjandi, og har afturat ber til at keypa t.d. IRC kupongir á posthúsunum og dollarar í bankunum. Tú skalt tó vera greiður yvir, at IRC á posthúsinum kostar umleið 10 krónur, meðan tú í frímerkjum bert fær 6,50 kr., sum svarar til postgjald fyri 20g bræv í luftposti út um Evropa.
Sum tíðin fer, finnur tú tó eisini út av, at beinleiðis QSL er ikki bara, sum at siga tað, og tað kann væl taka langa tíð, og tolið slítist eisini her. Ofta verða QSL-kortini fyri eina DX-ferð kanska ikki prentað, fyrr enn DXarin kemur heim aftur, eftir at hava fingið upp í fleiri loggbøkur, og skal viðkomandi so leggja úrslitið inn á PC-logg skrá, so kann bíðitíðin lættliga koma upp á fleiri mánaðar og í versta føri eitt ár ella so, men tíbetur eru fleiri og fleiri, sum ON-Line-loggføra QSOini so hvørt.

*OY1CT, Carsten*
*2H týddi*

# Í Grønlandi við Thalu

## Palle Olsen, OY2VO, skrivar:

4. august 1976 legði Thala Dan frá bryggju í Aalborg, og setti kós norðureftir. Vit sigldu norður um Føroyar og Ísland og komu tætt fram við Jan Mayen.

Fyrstu fimm dagarnar høvdu vit vanliga sigling, men seinastu 2 samdøgrini høvdu vit meira og meira ís uttan um skipið, og hendan ferðin, ígjøgnum íshavið uttan um okkum, var so undurføgur og spennandi, at vit høvdu neyvan tíð at fáa blund í eyguni! - men so kom veðurstøðin, Danmarkshavn, undan havsbrúnni.

Tyrlan hjá skipinum hevði annars tá longu ofta verið á flogi fyri at vita, hvussu best var at koma ígjøgnum hjá skipinum, tí, hóast Thala Dan var ísstyrkt, so var hon eingin ísbrótari.

Umframt skipsmanningina vóru avloysarar við til veðurstøðina, og so eisini nøkur eldhugað ferðafólk. Vit vóru móttikin úti á "pakkísinum" av 3 monnum frá veðurstøðini, og seinni, tá ið vit komu til akkersplássið, fingu vit, sum siður er, eina móttøkuheilsan av dynamitti og tyrlubensini, sum bæði hoyrdist og sást!

Tá skipið var lossað 4 dagar seinni, var so stundin komin at siga tí farvæl: ein heilt løgin kensla, tí vituligt var, at einki skip kom aftur tey fyrstu 2 árini!

Veðurstøðin, Danmarkshavn, liggur á 76.46N og 18.46W. Navnið stavar frá 1906-08, tá ið skipið "Danmark" hevði vetrarhavn her undir nógv umtalaðu "Danmarks-ekspeditiónini" hjá Mylius Erichsen.



Nøkur fá hús, 11 mans, ein rúgva av sleðuhundum, nakrir moskusoksar og við hvørt ein hugnalig ísbjørn.

Dagliga arbeiði er: 4 mans, sum 2 ferðir um samdøgrið senda eina radiosondu upp við ballón. Upplýsingarnar, sum komu niður aftur, vóru kodaðir, so vit 3 fjarritarar kundu senda teir víðari til Angmagssalik. Har afturat høvdu vit veðurfrásagnir triðjahvønn tíma. Tá veðurfrásagnirnar vóru avgreiddar, var eitt sindur av telegrammum til okkara ella til Sirius-patruljuna í Daneborg ella á Station Nord.

Um summarið høvdu vit sum eina hugnaliga broyting ta gleði at tosa við GGU (Grønlands Geologiske Undersøgelser). Tann seinasti av teim gomlu "grønlandsfarunum", Eigil Knuth, kom eisini í radiologgbókina hvørt summar, tá hann var á ferð við tjaldi.

Fyri at bæði støð og manning skuldi vera væl fyri, høvdu vit ein maskinpassara, ein teknikkara, ein húsavørð og ein kokk.

Vit máldu t.d norðlýsið og tal av sólskinstímum. Seismografurin vísti, umframt jarðskjálvtar, eisini nær moskusoksarnir høvdu verið ov nær sensorunum.

Hevði onkur hug at tosa við familjuna heima, so var tað eisini fjarritarin, neistin, sum skuldi til arbeiðis og avgreiðasamrøðu um Lyngby Radio, sum oftast á 12 MHz. Tað gekk ofta ein góð løta, áðrenn hetta eydnaðist.

Útgerðin var 2 1,5KW Granger og ein Butterfly-antenna..

Kaðalin til antennuna var 400 metrar langur, so har kom ikki so nógv effekt út suðureftir.

Til dagligu ferðsluna høvdu vit ein 4 KW Wilcox sendara, og frekvensurin, vit nýttu oftast, var 5,2 MHz. Móttakararnir vóru Collins og Racal.

Kom tað fyri, at kokkurin hevði tendrað allar kókipláturnar, so orkaði generatorin ikki samstundis at hjálpa okkum telegrafistum, og vóru fleiri telegramm, so kom tað meira enn so fyri, at kokkurin mátti sløkkja alt, og so kom náttúrðin kanska nakað seint á borðið.

Av tí, at veruliga arbeiðið á støðini ikki tók allan dagin, var nógv frítíð. Um summarið var gingið nógv og langt, og um veturin, t.v.s. frá umleið oktober til juni, brúktu vit hundasleðurnar nógv.

Har var vanliga kalt í veðrinum, og minus 34 stig, var onki at rópa um, men av tí, at vindurin frá innlandsísinum var so turrur, bilti hetta als ikki.

Eitt væl dámt ítriv var foto. Náttúran og djórini fingu av at vita: frá hermalín og snjóharum til moskusoksar og ísbjarnir. Ja, har høvdu vit heimsins størsta fríøki, har alt var friðað, hóast eg ongantíð ivist í, at onkur snjóharan varð skotin - um ikki annað, so í sjálvverju!

Í dag er sjálvandi nógv broytt. Eitt øki, 300 ferðir so stórt sum Føroyar, har bert 30 mans búðu, er rúmshátt, og har ber til at liva og gera, sum ein vil, uttan at nakar finnist at tí.

Eitt ítriv, sum eg var einsamallur um, var amatørradio!

Útgerðin hjá mær var ein Drake C Line, Heathkit SB220, 3 træmastrar,42 metrar høgar, hevði eg eisini. Eina Th3mk3 hevði eg so sett upp, og hon kundi lættliga senda kring knøttin.

Nú er tað soleiðis, at longur norður tú kemur á knøttinum, meira skiftandi gerast líkindini, og fullkomin tøgn, Blackout, í móttakaranum kemur ofta fyri, - og stendur ofta við í longri tíð. 3 vikur, uttan at hoyra nakað sum helst á nøkrum frekvensi, havi eg ofta verið úti fyri.

Træmastrarnar vóru settar upp í 1948, og vóru eins og nýggjar. Rot kom ikki fyri í tí turru luftini, og tá ið eg tók 2 ára gomlu beamantennuna niður,sá hon út sum nýggj. Saltluftin, sum oyðileggur alt her í Føroyum, var ókend har yviri!

Av tí, at har var myrkt í hálvantriðja mánaða, var tað gott at hava eitt spennandi ítriv, og serliga tá eg hevði 2 svágrar, sum eisini vóru radioamatørar. Miðnáttarsól alt summarið er gott, men . . .

Í oktober 1978 vendi eg aftur til Danmarkar fyri at liva m.a. eitt meira vanligt lív. Mær longdist tó eitt sindur eftir at sleppa "útaftur", og hesa ferð kom so leiðin at liggja til Føroyar, men í summar er arbeiði mítt liðugt her, og vit fara so aftur suðureftir, og vit fáa mold av Fjóni undir naglarnar aftur!

Um onkur hevði haft áhuga at sæð nakrar dias-myndir frá Grønlandsferðini, hevði eg fegin víst tær okkurt kvøldið í Hamrabú!

## Til sølu!

1 stk. ICOM-751 2 mtr. FM/SSB 10x sendari
1 stk. Kenwood-751 2 mtr. FM7SSB 25 w sendari
1 stk. TONO 100w, 2 mtr. PA-trin
1 stk. 2x10 el.cross beam 2 mtr.
2 stk. HF-støðir 100w, 10-80 m
2 stk. YEASU 780, 70 cm FM/SSB 10w sendari
1 stk. HF PA-trin 10-80 m
2 stk. YEASU mikrofonir

***Jón Dam***
tlf. 18800

## Limagjald

Um so er, at adressan hjá tær á baksíðuni hevur reyðan kross, so er tað tí, at tú OY-aranum kunnugt, ikki hevur goldið limagjaldið fyri 1993.
Send limagjaldið sum skjótast til giro nr. 50881, ella tosa við kassameistaran, um so er, at tú hevur goldið og hevur kvittan.

# Triade verkætlanin

Sum nevnt í "OY-aranum" hevur danska radioamatørsamgongan, EDR, í "OZ" nr. 8/92 og 9/92 kunngjørt nýggja verkætlan við heitinum Triade.

Verkætlanin er ætlað limafeløgunum hjá EDR fyri at fremja áhugan fyri amatør radio.

Verkætlanin er í fleiri pørtum. Tveir av hesum eru ein fyrilestrarpakki og ein skeiðpakki, har skeiðpakkin er ætlaður sum eitt byggiskeið fyri byrjarar.

Byggipakkin viðger bygging av einum einføldum morsegeneratori við ljóði, einum LF-megnara, einum 80m móttakara og einum 2m móttakara, og áðrenn komið verður til móttakararnar eru nakrar royndir við einum kristaltóli.

Verkætlanin varð viðgjørd í "OZ" nr. 8/92 í stuttum, og í "OZ" nr. 9/92, har einar 7-8 síður vóru avsettar til 2m móttakaran.

Vejle R. C. Elektronik hevur byggisett til verkætlanina. Prísurin fyri settið er í Danmark 330 krónur, og verður ivaleyst eitt sindur hægri í Føroyum

X

Jan Egholm,
OY3JE - Lnr. 378
Postbox 3033,
110 Tórshavn. Lånv.

# DX

**A71.** Qatar. A71AL/SP5EXA nýtt kallimerki A71CW, sera virkin, 3501 19-20.00z.
**CYø.** Sable Is. VE1CBK qrv.
**FT4.** Crozet Is. Hoyrt 14114 & 21152 um leið 15-16.00z
**GU.** Alderney Is. GU6YB, DX-ferð 26.-29.03.93, 10-160 m SSB, WARC-bond CW, qsl til G3SWB.
**HC8.** Galagapos Is., HC8A frá 2. til 29. mars. QSL um WV7Y.
**KC6.** Rep.Belau. KC6MS 28.-31.03.93, SSB & RTTY, øll bond, qsl um JA6EGL.
**OD.** Libanon. OD5/SM3IKQ til 8. apríl.
**TT.** Tchad. WA9OBO, qrv sum TT8OBO frá 15.03 til 30.04.93. FD1SIL qrv sum TT8AKX í mars.
**TZ.** Mali. TZ6RM qrt frá 30. apríl.
**VU7.** Andaman & Nicobar Isl. kanska qrv í mars ella apríl. XT. Burkina Fasu. XT2BW, qrv RTTY-contest í mars, sum XT93BW í WPX-kapping, qsl um WB2YQH.
**5Z.** Kenya. 18 Mhz er loyvt frá á jólum 1992, 5Z4FM qrv.
**9K.** Kuwait. 9K2ZZ qrv 160 m 00.00 - 03.45z týsdag, mikudag og hósdag.

**Nýtt forskoyti:**
**Y2-Y9.** Frá 1. januar 1993 vera nýggj kallimerki í raðnum DL1-9.

# Páskakappingin 1993

Fráboðan um páskakappingina er nú komin okkum í hendi. Í ár er tað OZ, sum stendur fyri hesum tiltaki, og tað er OZ3PE, Arne Pedersen í Køge, sum er ábyrgdarmaður.
Reglurnar, sum vit endurgeva á upprunamálinum, eru hesar:

**"OX-OY-OZ**
**Skærtorsdagstesten 1993"**

**Testperioder:** Skærtorsdag den 8. april 1993 kl. 1100-1500 og 2100-2400 UTC.
**Deltagere:** Single operator og Multi TX/Klubstation er i OX, OY og OZ samt SWL i OX, OY og OZ.
Kun forbindelser mellem OX og OY, OX og OZ samt mellem OY og OZ.
Det samme gælder for SWL.
**Frekvenser:**
**CW:** 3510-3540, 7005-7035, 14010-14040, 21010-21040 og 28010-28040 kHz.
**Phone:** 3735-3775, 7040-7100, 14125-14275, 21150-21250 og 28300-28400 kHz.
**RTTY:** 3580-3590, 7035-7040, 14080-14090, 21080-21090 og 28050-28060 kHz.
**Opkald:** CQ OX OY, CQ OX OZ eller CQ OY OZ.
**Kodegrupper:** RS(T) + serienummer fra 001.

hvert bånd med CW, een gang med Phone og een gang med RTTY, d.v.s. samme station kan højst kontaktes på 5 bånd med 3 forskellige modes. Crossmodes tæller ikke med.
**Points:** Første periode: Alle kontakter 2 points.
Anden periode: Alle kontakter 4 points.
Deltagere med C-licens får et tillæg på 100%.
**Logs:** Sædvanlige A4 format med dato, tid (UTC), bånd, mode, kontaktet station, modtaget og afsendt kodegruppe samt points.
**Diplomer:** Der gives diplom til den, der i hver klasse - single operatør, klubstation eller SWL - har opnået det bedste resultat.
**Indsendelsesfrist:** Logs skal være poststemplet senest den 15. maj 1993 og indsendes til
OZ3PE, Arne Pedersen
Græsmarksvej 12 st. th.
4600 Køge

### Gevið gætur!

Ansið væl eftir, at ávístu frekvensøki verða hildin, og minnist til, at tá ella um skift verður millum CW, phone og/ella RTTY, so skift eisini til tað frekvensøkið, sum hoyrir til viðkomandi mótingarhátt.